# – Vit mugu ikki gloyma andak



– Tað er tíverri bara eg sum eru urguleikari her í Hesti. Skal eg burtur úr bygdini roynir eg at finna onkran annan at spæla fyri meg. Annars má deknurin, sum hevur gott mála at syngja fyri, sigur Jørmundur Zachariassen

**Í sløk fimmti ár hevur Jørmundur Zachariassen røkt tænastuna sum urguleikari við Hests kirkju.
– Hetta er mín tænasta í kirkjuni, sigur hann**

URGULEIKARI
*Orð&myndir: Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

Tað er sunnumorgun í Hesti. Í bygdini valdar friður, og ikki eitt menniskja er at síggja. Gjøgnum bygdina fer ein maður gangandi. Við álvarsomum bragdi fer hann frá húsum og gongur norður gjøgnum bygdina.

Hann veit hvat hann skal og hvar hann skal. Tað veit bygdarfólkið eisini: Hetta er Jørmundur. Urguleikarin í kirkjuni.

Um skamma stund fer klokkarin at boða til gudstænastu við kirkjuklokkuni. Tá klokkan er liðug at ringja er Jørmundur klárur við einum forspæli – præludium. Prestur fer á knæ frammanvert altarið og deknurin byrja at lesa inngangsbønina.

Nú er klárt til fyrsta sálmin í hesi gudstænastuni. Sum oftast er tað deknurin, ið lesur ein lestur, men við regluligum millumbilum er prestur í bygdini.

Men líka vist sum amen í kirkjuni er tað, at uppgávan – ella rættari sagt: trúgva tænastan – hjá Jørmundi verður fullførd við stórum kærleika móti kirkjuni.

Og kærleiki má tað sigast at hava verið, tí í roynd og veru hava bert verið tveir fastir urguleikarar í Hesti síðani kirkjan varð vígd í 1911 – Hans Edvard Thomsen og síðani seinast í 50'unum Jørmundur Zachariassen.

Hetta er kortini ikki nakað sum Jørmundur vil ger nakað serligt burturúr. Tí, sum hann sigur:

– Hetta er mín tænasta í kirkjuni!

## Tveir urguleikarar

Uttan teir trúgvu kirkjutænararnar í øllum landsins kirkjum hevði verið trupult, fyri ikki at siga ógjørligt at varðveitt ta skipan vit hava í dag við gudstænastum við presti ella lestri.

Deknar og klokkarar hava her tikið sítt tak í tænastuni fyri kirkjunnar Harra. Í onkrum kirkjum finst eingin urga, men parturin hjá urguleikaranum hevur ikki ligið eftir.

Tak bara Hests kirkju sum dømi: Tann undanfarni urguleikarin byrjaði, tá kirkjan varð vígd, men síðani hann legði frá sær hevur Jørmund trúfastur røkt hesa tænastuna.

– Tað var í roynd og veru Hans Edvard sum bað meg hjálpa sær at spæla til gudstænasturnar. Hann hevði henda dagin longu sett sálmarnar upp, og helt helst, at eg mundi fara at klára at spæla teir.

– Hans Edvard legði dent á, at hetta vóru lættir sálmar, greiðir Jørmundur frá.

Henda sunnudagin fór Hans Edvard síðani fram í kór at lesa dagsins epistul, men kom ikki uppaftur á loftið, har urgan stendur. So líðandi gjørdist tað bara til tað, at Jørmundur spældi oftari og oftari.

## Fleiri ymisk løg

– At enda las hann tað, sum lesast skuldi, og eg spældi til sálmarnar, sigur Jørmundur.

Í dag nýtist honum ikki at venja sálmarnar stórvegis frammanundan gudstænastuni. Hann kennir løgini og tí er ikki neyðugt við hesum.

Men Jørmundur svevur tó ikki í hesum, tí honum dámar eisini væl at brúka tey nýggjaru løgini - eisini til teir gomlu sálmarnar.

– Tak til dømis lagið til sálmin nr. 198: "Sum ígjøgnum sortar skýggja". Har er mest vanligt at brúka lagið "Tag det sorte kors fra graven". Tað havi eg mangan brúkt sjálvur, men nú hevur Heri Eysturlíð skipað eitt annað gamalt føroyskt lag til henda sangin, og tað brúki eg onkutíð.

– Men tað er líkasum at fólk vilja hava tey gomlu og kendu løgini.

Tá hann byrjaði sum urguleikari var bara tann eina nótabókin, tann hjá Bielefeldt í kirkjuni. Seinni keypti hann sjálvur hina nógv nýttu nótabókina, nevniliga Koralbogen.

## Urga av Strondum

At Jørmund yvirhøvur var biðin til urguleikara komst helst av at hann um hetta mundið hevði fingið urgu í húsið.

– Eg veit ikki. Eg lærdi meg eitt sindur, hóast eg ikki á nakran hátt vil siga, at eg dugdi at spæla. Hans Edvard greiddi mær frá nótunum, og soleiðis varð tað bara. Eg fekk fatur á einum urguskúla, men eg vil tó kalla meg sjálvlærdan, sigur Jørmundur, sum annars bert spælir við tveimum fingrum.

Urguna fekk Jørmundur í roynd og veru av Strondum. Hetta var ein traðkiurga, sum Stranda skúli ætlaði at